# KRABBAMEINSFELAGIÐ

ÁRSFRÁGREIÐING 2017

## Krabbameinsfelagið

Grønlandsvegur 58
Postboks 1216
110 Tórshavn
Telefon: 31 79 59
Heimasíða: www.krabbamein.fo
T-postur: kmf@krabbamein.fo

Starvsfólk
Dagligur leiðari:
Jansy Gaardlykke
Ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingur:
Sólrun Jacobsen
Skrivstova:
Poula Norðbúð

## Nevndin í Krabbameinsfelagnum

Formaður: Durita Tausen
Næstformaður
& kassameistari: Sonja Nielsen
Nevndarlimur: Magnus Magnussen
Nevndarlimur: Katrin Kallsberg
Nevndarlimur: Johan Poulsen

Tiltakslimur: Martin Joensen
Tiltakslimur: Elmar Ósá

## Hjálpargrunnurin

Durita Tausen
Katrin Kallsberg
Jónvør Christiansen

## Team Rynkeby Føroyar

Elmar Ósá
Katrin Kallsberg
Durita Tausen

# Innihald

Fororð ... 1
Átøk, samstørv og annað virksemi ... 3
- Team Rynkeby Føroyar ... 3
- Grannakaffi er meira enn krónur og oyru ... 3
- Gongu½maraton ... 4
- Føroya vakrasta hálv maraton saman við Ítrottarfelagnum Frælsi og Krabbameinsfelagnum ... 4
- Almennir fyrilestrar um seinfylgjur eftir krabbameinssjúku og krabbameinsviðgerð ... 4
- Heldin - blað um Krabbameinsfelagið ... 4
- Undirvísing og almennur fyrilestur um, tá krabbamein ávirkar kynslívið ... 5
- Rørslutiltak í Suðuroy ... 5
- Lesandi í observatiónsklinikk ... 5
- Stuðulin frá Spyr.fo munar væl hjá Krabbameinsfelagnum ... 6
- 62°N vinna stuðlar Krabbameinsfelagnum ... 6
- Evropeiskt og Norðurlendskt samstarv ... 6

Ráðgeving og hjálparbólkar ... 7
Virksemi í ymsu bólkunum ... 8
- Foreldrabólkurin: ... 8
- Prostatabólkurin: ... 8
- Stomibólkurin: ... 8
- Lip- og lymfødembólkurin: ... 8
- Móðurmerkjabólkurin: ... 9
- Bót til Bata: ... 9
- Undirlívsbólkurin: ... 9
- Seinfylgjubólkurin: ... 9

Tilboð til sjúklingar og avvarðandi ... 10
- Samtalubólkur fyri tey, sum hava mist makan ... 10
- Samtalubólkur fyri fólk, sum eru sjúk av krabbameini: ... 10
- Skeið í hár-, húð- og andlitsrøkt fyri kvinnur við krabbameini: ... 10
- Familjusamtalur: ... 10
- Listterapi: ... 10
- Opið Hús ... 10
- Sosialráðgevi: ... 11

Krabbameinshagtøl ... 12

# Fororð

Fært tú boðini, at tú ella ein av tínum hevur fingið krabbamein, er tað, sum at alt stendur stilt, og óteljandi tankar fara gjøgnum høvdið eftir lítlari løtu. Tað kennist, sum verður grundvøllurin skakaður. Tá er gott at hava hollar stuðlar at styðja seg til – familju, vinfólk, starvsfelagar, grannar og onnur. Ein av høvuðsuppgávunum hjá okkum í Krabbameinsfelagnum er eisini at hjálpa. Birta vón og lívsmót. Lætta um, tá ið harðast leikar á. Ráðgeva og stuðla.

At tað ber til hjá Krabbameinsfelagnum at veita góða og munadygga hjálp, kemst serliga av góðum fíggjarligum stuðlum og øllum tí munadygga arbeiði, sum sjálvboðin gera. Hetta ger, at vit betur kunnu røkka málinum at hjálpa teimum, sum hava ella hava havt krabbamein, umframt at stuðla gransking og gera fyribyrgjandi arbeiði.

Eisini 2017 hevur hilnast væl, og nógv er at vera takksom fyri. Aftur kunnu vit ásanna, at Krabbameinsfelagið hevur stóra vælvild millum føroyingar. Millum fyritøkur, myndugleikar, fjølmiðlar, privatfólk, sjúklingar og tey, sum varða av.

Undirtøkan fyri Grannakaffi hevur verið góð, fíggjarligur stuðul er fingin til vega til m.a. at geva blað út, ferðaskrivstovan 62°N hevur gjørt av at stuðul fyri hvønn ferðaseðil, sum vinnudeildin selur, umframt at vit hava fingið annan fíggjarligan stuðul.

Team Rynkeby Føroyar fekk aftur í ár so stóran stuðul, sum ongatíð fyrr, og 2017 er eisini árið, har tey hava gjørt av eisini at stuðla børnum, sum hava álvarsliga hjarta- ella lungnasjúku.

Lip- og lymfødemfelagið er nú partur av Krabbameinsfelagnum, sum sjálvstøðugur hjálparbólkur. Tað fegnast vit um, tí tað vísir seg, at tað eru sera nógvir krabbameinssjúklingar, ið fáa lymfødem eftir sjúku og viðgerð fyri krabbamein.

Vit takka innarliga fyri alla vælvild, stuðul og tíð, sum tit øll geva felagnum.

- o -

Gransking er alneyðug fyri at loysa krabbameinsgátuna og fyri at tryggja, at krabbameinssjúklingar fáa so góða viðgerð og góðan stuðul, sum til ber.

Vit gleðast um, at í 2017 er gongd komin á granskingina. Krabbameinsfelagið og Team Rynkeby hava játtað samanlagt 700.000 kr. til eina phd-verkætlan við heitinum “Kortlegging og greining av krabbameinstilburðum í Føroyum”. Granskingarráðið hevur eisini veitt meiri enn 1,1 mió.kr. í stuðli til hesa verkætlanina, umframt 300.000 kr. Samanlagt til tvær aðrar verkætlanir á krabbameinsøkinum.

- o –

Í 2009 varð fyrsta krabbameinsætlan gjørd fyri Føroyar. Eitt tilmæli var, at seta í verk skreening fyri bróstkrabba. Í 2017 varð komið á mál við tí. Allar kvinnur millum 50 og 69 ár fáa nú annaðhvørt ár tilboð um at verða kannaðar.

Krabbameinsætlanin fer skjótt at ganga á 10 ári. Tað er høgur aldur fyri eina krabbameinsætlan. Í Krabbameinsfelagnum høvdu vit vónað, at vit í ársfrágreiðingini fyri 2017 kundu skrivað, at nú er skjøtul settur á at gera nýggja krabbameinsætlan. So er tíverri ikki og tað harmar okkum nógv. Landsstýriskvinnan hevur, bæði í talu og skrift, tikið undir við, at tíðin er búgvin, at vit fara undir at gera nýggja krabbameinsætlan.

Okkara áheitan er tí, at landsstýriskvinnan vísir tað í verki. Ongantíð ov skjótt.

**Durita Tausen**,
*forkvinna í Krabbameinsfelagnum*



## Átøk, samstørv og annað virksemi

**Team Rynkeby Føroyar**
Peningurin, sum Team Rynkeby Føroyar savnaði inn í sambandi við túrin til París í 2017, varð handaður 10. september 2017 á samkomu á Reinsarínum. Innkomna peningaupphæddin í ár er 1.200.000 kr.

Alfred Hummeland frá Team Rynkeby Føroyar handaði peningin, og segði í tí sambandi, at í ár eru tað fleiri sjúkubólkar enn áður, sum fáa ágóðan. Tá Team Rynkeby Føroyar byrjaði á sinni, var peningur bara latin til børn við krabbameini og familjur teirra. Nú eru børn við lungnasjúkum og hjartasjúkum eisini partur av Team Rynkeby Føroyar.

Magnus Magnussen, nevndarlimur í Krabbameinsfelagnum, tók ímóti kekkinum og segði, at Krabbameinsfelagið eins og Team Rynkeby Føroyar er vælgerandi felagsskapur, sum vil gera gott fyri onnur. Henda peningaupphædd verður brúkt til gransking og til familjurnar og børnini, sum hava lívshættisliga sjúku.

Eydna Joensen frá Hjartabarninum segði, at Team Rynkeby Føroyar familjan hevur gjørt tað, at tey sjúku børnini og familjur teirra eisini kunnu fáa ein lítlan ugga undir teirra sjúkuviðgerð.

Krabbameinsfelagið umsitur peningin, og familjur at børnum við lívshættisligum sjúkum og onnur kunnu venda sær til Krabbameinsfelagið at fáa meiri kunning um stuðulsmøguleikar.

**Grannakaffi er meira enn krónur og oyru**
Grannakaffi var fyriskipað á triðja sinni, og var 11.-12. mars 2017. Hesa ferð var tað nakað væl torførari at fáa vertir at tekna seg og endaliga talið varð 70 vertir, samanborið við um 100 vertir í 2015 og 2016. Tó hevur gongdin eisini verið, at tiltøkini eru størri í vavi, tí fleiri vertir sláa seg saman at hava Grannakaffi, ja heilar bygdir og stór feløg hava eisini verið vertir fyri Grannakaffi í ár. Til okkurt av størru tiltøkunum vóru ikki færri enn 400 gestir á gátt fyri at stuðla.

Vertirnir eru fegnir um høvið at práta um tað, sum vit vanliga ikki práta um í gerandisdegnum. At tosa opið um tey kæru, ið ikki eru millum okkum longur. Meginparturin av vertunum eru fólk, ið hava kent sviðan av krabbameini, og fyri tey er Grannakaffi eitt gott høvi at gera mun og hjálpa Krabbameinsfelagnum at hjálpa øðrum.

Inn komu góðar 400.000 kr. í stuðli, og hóast nakað slakari enn árini frammanundan, so er tó talan um eina stórfingna upphædd, sum Krabbameinsfelagið er ómetaliga takksamt fyri, og sum ger stóran mun í arbeiðinum hjá felagnum.

**Gongu½maraton**
Í allar fagrasta summarveðri 3. juni 2017 gingu 131 fólk hálvmaraton hjá Krabbameinsfelagnum, sum er ein partur av Tórshavn Maraton. Karmarnir vóru framúr góðir frá byrjan til enda. Annika Olsen, borgarstjóri, helt røðu og setti renningina í gongd. Eisini helt Durita Tausen, forkvinna í Krabbameinsfelagnum røðu. Bragdið og Krabbameinsfelagið samstarva um gongu½maraton, og ein partur av gjaldinum fer til Krabbameinsfelagið.

**Føroya vakrasta hálv maraton saman við Ítrottarfelagnum Frælsi og Krabbameinsfelagnum**
Ítróttarfelagið Frælsi í Vágum skipar árliga fyri eini hálv maraton renning í september. Runnið verður úr Gásadali og til kirkjuna í Sandavági.

Umframt vanliga hálv maraton renning, var í 2017, fyri aðru ferð, samstundis skipað fyri gongu½maraton. Hetta varð gjørt í samstarvi við Krabbameinsfelagið. Í 2017 vóru 360 luttakarar tilmeldaðir og inn komu kr. 36.000,- í stuðli.

**Almennir fyrilestrar um seinfylgjur eftir krabbameinssjúku og krabbameinsviðgerð**
Viðgerð fyri krabbamein er batnað nógv seinastu árini og alsamt fleiri gerast frísk, men kortini eru tað fleiri, sum fáa seinfylgjur av sjúkuni og viðgerðini. Fylgjur, ið eisini kunnu vísa seg nógv ár seinni, og sum kunnu vera til stóran ampa. Krabbameinsfelagið skipaði fyri fyrilestrum um evnið 26. oktober 2017.

Fyrilestrarhaldari var Cecilie E. Kiserud, yvirlækni og serfrøðingur í onkologi. Hon er leiðari fyri 'Nasjonal kompetansetjeneste for seneffekter etter kreft' á Oslo Universitetssykehus. Hon hevur í nógv ár arbeitt á júst hesum øki.

Fyrri fyrilesturin var fyri heilsustarvsfólkum, sum í sínum starvi koma í samband við krabbameins-sjúklingar og teirra avvarðandi.

Seinni fyrilesturin var almennur og ætlaður teimum, sum hava seinfylgjur av krabbameinssjúku og krabbameinsviðgerð, umframt øllum øðrum áhugaðum. Til seinna fyrilesturin kundu fólk tekna seg sum lim í einum nýggjum hjálparbólki hjá Krabbameinsfelagnum, nevniliga Seinfylgjubólkinum.

**Heldin - blað um Krabbameinsfelagið**
Fyri at Krabbameinsfelagið kann hjálpa so væl sum til ber, mugu so mong sum gjørligt vita, hvørja hjálp felagið kann veita, og tí varð tikið stig til at geva út eitt blað saman við Sosialinum.

Í blaðnum vóru samrøður við Sædis Eilifsdóttir, Henry Fjallstein, Anne Marie Gøricke, Otto Gram og Heidi Hvidbro, sum eru nøkur teirra, sum hava leitað sær hjálp hjá Krabbameinsfelagnum farnu árini. Umframt tað vóru eisini greinir um, hvat krabbamein er, hvat kann gerast fyri at fyribyrgja krabbameini, hvørji tilboð felagið hevur, hvussu felagið varð stovnað, og hvørjar royndir ráðgevingarstovan hjá felagnum hevur.

Blaðútgávuna stuðlaðu: JFK, Samskip, Tryggingarfelagið Føroyar, Svend Krosstein og Trygd.

## Undirvísing og almennur fyrilestur um, tá krabbamein ávirkar kynslívið

Bæði sjúka og viðgerð av krabbameini kunnu geva sálarlig og kropslig árin, sum ávirka kynslívið.

Hvørjir møguleikar eru fyri at viðgera kynsligar trupulleikar í samband við sjúku og viðgerð fyri krabbamein? Og hvussu kunnu heilsustarvsfólk ráðgeva í truplum spurningum um kynslív?

Hetta vóru m.a. spurningar, sum tær báðar Anette Højer Mikkelsen serfrøðingur í sexologiskari ráðgeving, kliniskur sjúkrarøktarfrøðingur, cand.cur. og Birgitte Schantz Laursen serfrøðingur í sexologiskari ráðgeving, lektor og phd. undirvístu og ráðgóvu um á Hotel Hafnia í november 2017. Báðar starvast tær á 'Sexologisk Center' á Aalborg Universitetshospital.

Um dagin varð skipa fyri undirvísing fyri heilsustarvsfólki - læknum, sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum o.ø., sum koma í samband við krabbameinssjúklingar, bæði kvinnur og menn, ið kunnu væntast at hava árin á kynslívið í samband við sjúku og viðgerð av krabbameini.

Heitið á undirvísingini var: Hvussu kunnu sjúka og viðgerð ávirka kynslívið? Hvussu kunnu heilsustarvsfólk á bestan hátt ráðgeva í kynsligum spurningum, og í størri mun draga kynslívið inn, sum ein natúrligan part av heilsuarbeiðinum. Sera nógv fólk møttu til undirvísingina.

Seinni um kvøldið var almennur fyrilestur um, tá krabbamein ávirkar kynslívið. Tá var fokus á seksulogiska ráðgeving, tá kynslívið verður ávirkað av sjúku og viðgerð av krabbameini, likamligar og sálarligar trupulleikar, sum standast av viðgerð fyri ávísar krabbameinsjúkur, og um hvørjir møguleikar eru at fáa hjálp. Eisini komu tær inn á evni sum inkontinens (ringt við at halda uppá vatnið), venjingar av kokubotni og hjálpitól.

## Rørslutiltak í Suðuroy

Í 2017 varð farið undir regluligt rørslutiltak í Suðuroy. Tiltakið er fyri øll, sum hava ella hava havt krabbamein og teirra avvarðandi. Dentur verður lagdur á venjingar, sum geva styrki og konditión.

Krabbamein rakar ikki bert tann sjúka, men alla familjuna. Tí verður skipað soleiðis fyri, at familjan kann vera saman um at venja. Hetta verður ein løta, har til ber at hava tað stuttligt, mennandi og samstundis koma í betri venjing.

Rørsla og styrkivenjing hava stóran týdning, bæði likamliga og sálarliga. Ítróttur og rørsla betra um útlitini fyri at fáa heilsuna aftur, samstundis sum tað gevur styrki at standa ímóti hørðu viðgerðini.

Vant verður í Pálshøll í Vági týsdagar kl. 13.00 í svimjihyli og hósdagar kl. 13.00 í høll. Venjari er Sigurð Marner Simonsen, fysioterapeutur.

## Lesandi í observatiónsklinikk

Í oktober vóru 4 sjúkrarøktarfrøðilesandi frá sjúkrarøktarfrøðideildini á Fróðskaparsetur Føroya í observatiónsklinikk í Krabbameinsfelagnum.

Lesandi skuldu hesaferð hava fokus á heilsufremjandi og fyribyrgjandi sjúkrarøkt í samfelagsligum høpi, og skuldu skriva eina uppgávu útfrá teirra observatiónum á staðnum.

Tær lesandi vóru: Gunnvá Kjærbo, Birna T Mikkelsen, Elsa Hammer og Sunnvá Húsgarð.

**Stuðulin frá Spyr.fo munar væl hjá Krabbameinsfelagnum**

Spyr.fo og Krabbameinsfelagið hava ein stuðulsavtalu. Stuðulin fer til gransking og upplýsing um prostata- og bróstkrabba, sum eru størstu sjúklingabólkar hjá monnum og kvinnum.

Spyr.fo er skjótur, ómakaleysur og ókeypis stuðulsmøguleiki, har fólk stuðla við at svara skjótum spurnarkanningum á fartelefonini. Afturfyri letur tann, ið ger kanningina, 4 kr. pr. svaraða spurnaðarkanning til Krabbameinsfelagið.

4.000 føroyingar eldri enn 15 ár eru skrásettir hjá Spyr.fo.

**62°N vinna stuðlar Krabbameinsfelagnum**

Ferðamannaskrivstovan 62°N stovnaði í 2017 eina vinnudeild á ferðaskrivstovuni við Hoydalsvegin. Enn størri dentur fer at verða lagdur á vinnukundar og kundar frá tí almenna, og deildin fer burtur av at avgreiða arbeiðsferðir. 62°N hevur í hesum sambandi gjørt av, at fyri hvønn ferðaseðil, sum vinnudeildin selur, so letur 62°N Krabbameinsfelagnum 15 krónur.

**Evropeiskt og Norðurlendskt samstarv**

Í september var Krabbameinsfelagið á fundi í ECL (European Cancer Leagues). Fundurin varð hildin í Keypmannahavn.

ECL varð sett á stovn í 1980 og føroyska Krabbameinsfelagið hevur havt fullan limaskap síðan 2000.

Tilsamans eru 21 lond limir í felagskapinum. Feløgini í ECL brúka tilsamans 850 milliónir evrur í bardaganum móti krabbameini. Tilsamans hava feløgini 2.550 fólk í løntum starvi, umframt 200.000 sjálvboðin.

Aðalendamálið hjá felagsskapinum er at fylgja við og ávirka heilsupolitikkin í Europa.

Krabbameinsfelagið er eisini limur í NCU (Nordic Cancer Union). NCU er eitt samstarv millum tey norðurlendsku krabbameinsfeløgini. Endamálið hjá NCU er at tryggja bestu viðgerð fyri krabbamein og at seta í verk munagóð fyribyrgingarátøk í Norðurlondum. Í 2017 vóru 4 fundir í NCU, í Stokholm í februar, í Keypmannahavn í mai, í Stavanger í august og í Reykjavík í november.

## Ráðgeving og hjálparbólkar

Í Krabbameinsfelagnum hevur, sum undanfarin ár, verið nógv samskifti og samband við fólk við krabbameini, avvarðandi og onnur.

Tveir ráðgevandi sjúkrarøktarfrøðingar starvast hjá Krabbameinsfelagnum. Teir vegleiða, hava telefonviðtalu og beinleiðis samtalur við sjúklingar, familjur og avvarðandi. Sjúklingum stendur eisini í boði at gerast partur av samtalubólkum og sjálvhjálparbólkum.

Krabbameinsfelagið hevur í mong ár havt sosialráðgeva knýttan at felagnum.

Krabbameinsfelagið er talurørið hjá krabbameinssjúklingum og teirra avvarandi.  Tað er tí fremsta uppgávan hjá starvsfólkunum at varnast tørv og áhugamál hjá krabbameinsraktum, at menna tænastur og at skipa samskiftisátøk hareftir.

## Virksemi í ymsu bólkunum

Nógv virksemi er í ymsu bólkunum og skipað hevur verið fyri bæði fyrilestrum, hugnaløtum og øðrum átøkum.

**Foreldrabólkurin:** Foreldur at børnum við krabbameini skipaðu fyri hugnaløtum í 2017, millum annað helt Katrina L. Holm, sálarfrøðingur, eitt upplegg um, hvussu tað er at eiga barn við álvarsligari sjúku. Eisini hevði bólkurin sítt árliga jólaborðhald, sum í ár varð hildið í Seglhúsinum í Klaksvík. Tiltakið var sera hugnaligt. Nýggja nevndin skipaði seg soleiðis: Ella Leivsgarð, forkvinna, Magni Janskor, næstformaður og Finngerð Joensen, skrivari.

Fleiri limir í bólkinum vóru á árligu gallaveitsluni hjá Team Rynkeby Føroyar, sum varð hildin á Hotel Føroyum í februar, og tá Team Rynkeby Føroyar fór undir longu ferðina til París, helt Elsebeth Mohr Vang, ið sjálv hevur havt krabbamein sum barn, røðu fyri súkklarum og hjálparfólkum.

**Prostatabólkurin:** Prostatabólkurin hevði tveir fundir í 2017 og undirtøkan var góð. Í mai skipaði bólkurin fyri hugnaløtu. Og í oktober hevði bólkurin ein fund, har Johan Poulsen yvirlækni og urologur segði frá tí nýggjasta innan viðgerð fyri prostatakrabba.

Í november vóru tveir sexologar í Føroyum og høvdu fyrilestur um kynslív og teir trupulleikar, sum standast av krabbameinsviðgerð, og hvussu ein kann fáa hjálp at bøta um tað.

**Stomibólkurin:** Seinastu árini hevur ikki verið nakað virksemi í bólkinum. Dansac & Hollister skipaðu enn einaferð fyri hugnakvøldi fyri fólki, sum hava stomi, saman við stomisjúkrarøktar-frøðingunum Elin Vitalis og Lív Lognberg. Umboð frá Dansac & Hollister søgdu frá og vístu fram tað nýggjasta innan stomiútgerð. Nógv fólk møttu.

**Lip- og lymfødembólkurin:** Í 2017 varð Lip- og Lymfødemfelagið lagt undir Krabbameinsfelagið sum ein sjálvstøðugur hjálparbólkur. Tað eru sera nógvir krabbameinssjúklingar, ið fáa lymfødem eftir sjúku og viðgerð fyri krabbamein.

Árið byrjaði við, at Lip- og lymfødembólkurin hevði eina hugnaløtu, har greitt varð frá, hví felagið var niðurlagt og í staðin varð stovnað sum ein bólkur undir Krabbameinsfelagnum. Eisini søgdu fysioterapeutarnir Sandra Jovevic og Agnas Mortensen eitt sindur um viðgerð av lip- og lymfødem.

Í apríl luttók bólkurin, tá ið umboð fyri Mediq vóru og vístu teirra lymfødem maskinu fram umframt ymsa aðra kompressiónsviðgerð.

Í september varð Pernille Krogh frá Apodan Nordic og vitjaði. Pernille vísti fram ymsar komressiónspumpur og limirnir sluppu at royna tólini.

Nevndin í Lip- og lymfødembólinum er: Eyðbjørg Djurhuus, forkvinna, Arnhild Johannesen, Anne Lisa Davidsen, Lív Petersen og Bjørg Thomsen.

**Móðurmerkjabólkurin:** Tað eydnaðist ikki Móðurmerkjabólkinum at hava fund í 2017. Hetta kann vera tekin um, at tað ikki er líka stórur tørvur á bólkinum og at talið av tilburðum er støðugt og tað er gleðiligt. Bólkurin hevur ætlanir um at møtast á heysti komandi ár.

**Bót til Bata:** Bót til Bata og Krabbakvinnur skipaður fyri nógvum tiltøkum í oktober. Tær høvdu kvøldsetur í Fuglafirði, Tórshavn og Suðuroy, umframt at tær vóru bodnar við til alskyns tiltøk at siga sínar søgur. Elsa Bech hevði sniðgivið eitt armband til høvið og tilevnað tað saman við Krabbakvinnunum, sum er ein bólkur av yngri kvinnum, sum hava havt bróstkrabba. Bólkurin megnaði sannilig at seta sjóneykuna á bróstkrabba í ár.

Umframt øll tey tiltøk, bólkurin hevði og var við til í oktober, var eisini skipað fyri hugnakvøldi í Klaksvík um evnið "Møði eftir krabbamein" (fatique), umboð fyri bólkin luttóku á ráðstevnum í Tróndheim og Stokkhólm og umboð vóru eisini í Lindini og tosaðu um bróstkrabba. Bólkurin er eisini farin undir at fyrireika stóra norðurlendska bróstkrabbaráðstevnu, sum skal verða komandi ár.

**Undirlívsbólkurin:** Undirlívsbólkurin hevði eina hugnaløtu í 2017. Við til hugnaløtuna vóru umboð frá Tjaldurs Apoteki og SIRI og søgdu frá og vístu vørur fram, sum kunnu linna og hjálpa eftir viðgerð fyri undirlívskrabba.

**Seinfylgjubólkurin:** Seinfylgjubólkurin hevði stovnandi fund í desember 2017. Nógv fólk møttu til fundin og avgjørt var at møtast aftur á vári komandi ár og skipa bólkin, og síðani at fara undir regluligar hugnaløtur og almenn tiltøk.

## Tilboð til sjúklingar og avvarðandi

**Samtalubólkur fyri tey, sum hava mist makan:** Endamálið við at savna fólk, ið hava mist makan, er at geva tí einstaka møguleikan at seta orð á og viðgera tær kenslur, tankar og trupulleikar, sum eru, tá ið tú missir makan. Samtalurnar við onnur í somu støðu kunnu stuðla og styrkja víðari í lívinum.

**Samtalubólkur fyri fólk, sum eru sjúk av krabbameini:** At vera sjúk/-ur og fáa viðgerð fyri krabbamein kann vera sera tyngjandi og ávirka alla tilveruna, viðgerðin hevur ofta hjáárin við sær og sálarliga kann tað eisini vera torført. At hitta onnur í líknandi støðu kann gera stóran mun. Okkara royndir vísa, at tað hjálpir at práta við onnur og seta orð á og deila ymiskar upplivingar. Hetta minkar um óttan, og tú fært lættari greiðu á tí, sum bilgist innaní av kenslum og tonkum. Lívsmótið og lívsgóðskan gerast størri, og dagligu avbjóðingarnar verða lættari.

**Skeið í hár-, húð- og andlitsrøkt fyri kvinnur við krabbameini:** Body Shop í SMS skipar regluliga fyri skeiðum í hár-, húð- og andlitsrøkt. Umframt starvsfólk er eisini hárskeri við royndum í at gera hárkollar til staðar. Skeiðið er fyri kvinnur, sum nýliga eru byrjaðar í viðgerð fyri krabbamein. Skeiðið er ókeypis og Krabbameinsfelagið tekur sær av at lýsa við og kunna um skeiðini.

**Familjusamtalur:** Familjusjónarhornið hevur stóran týdning í ráðgevandi arbeiðinum hjá felagnum. Tá ið ein í familjuni gerst sjúk/ur ella doyr, rakar tað alla familjuna, eisini børnini.

Endamálið við familjusamtalum er, at øll í familjuni í felag fáa sett orð á tað, sum er svárt og torført og á tann hátt fáa hjálp til í felag at stuðla og hjálpa hvør øðrum.

**Listterapi:** Í 2017 var aftur skipað fyri listterapi-skeiðum fyri fólki, sum hava ella hava havt krabbamein. Listterapiskeið eru 2 ferðir árliga, á vári og á heysti.

**Opið Hús:** Opið hús er eitt tilboð, ætlað fólki, sum hava ella hava havt krabbameini. Høvi er at støkka inn á gólvið, og fáa ein drekkamunn, eitt prát við onnur í somu støðu ella við starvsfólk í felagnum, um tørvur er á tí. At hitta onnur í líknandi støðu kann gera stóran mun. Okkara royndir vísa, at tað hjálpir at tosa við onnur og seta orð á og deila ymiskar upplivingar. Hetta minkar um óttan, og tú fært lættari greiðu á kenslum og tonkum. Lívsmótið og lívsgóðskan gerast størri, og dagligu avbjóðingarnar verða lættari.

**Sosialráðgevi:** Í 2017 vóru tað 30 persónar, sum vendu sær til sosialráðgevan. Orsøkin var í høvuðsheitum, at inntøkugrundarlagið var hótt – antin tí tey vóru uppsøgd úr teirra starvi, og uppsagnartíðin var við at renna út, ella tí veiting eftir sjúkradagpengalógini var um at vera uppi. Í nøkrum førum var vegleitt í at søkja fyritíðarpensjón, tí støðan tíanverri var soleiðis, at viðkomandi ikki megnaði at fara til arbeiðis aftur. Tey, ið møguliga ikki megnaðu at arbeiða fulla tíð vegna seinfylgjur av krabbameinssjúkuni, vórðu kunnað um møguleikan at koma í tillagað starv. Har útlitini vóru góð fyri, at tey aftur komu í vinnu, men megnaðu hetta ikki áðrenn uppsøgnin fekk virknað ella áðrenn 40 viku regluna í sjúkradagpengalógini gjørdi seg galdandi, var víst til at søkja forsorgarveiting.

Í høvuðsheitum bøta verandi sosialu skipanir um fíggjarligu fylgjurnar av sjúkuni. Tó kundi verið arbeitt fram ímóti eini serligari reglu fyri tey, har útlit eru fyri at tey kunnu koma í arbeiði aftur, so at neyðugt er ikki við eini uppsøgn.

# Krabbameinshagtøl

**Krabbameinstilburðir í Føroyum árini 1995 - 2017**

| Krabbameinstilburðir í Føroyum 1995-2017 | |
|---|---|
| Ár | Tilburðir |
| 1995 | 180 |
| 1996 | 201 |
| 1997 | 178 |
| 1998 | 168 |
| 1999 | 183 |
| 2000 | 152 |
| 2001 | 165 |
| 2002 | 171 |
| 2003 | 167 |
| 2004 | 188 |
| 2005 | 210 |
| 2006 | 186 |
| 2007 | 198 |
| 2008 | 188 |
| 2009 | 230 |
| 2010 | 224 |
| 2011 | 195 |
| 2012 | 211 |
| 2013 | 216 |
| 2014 | 189 |
| 2015 | 235 |
| 2016 | 236 |
| 2017 | 252 |



## Tilburðir av prostatakrabba

| Prostatakrabbi 1995 - 2017 | |
|---|---|
| Ár | Tilburðir |
| 1995 | 7 |
| 1996 | 11 |
| 1997 | 4 |
| 1998 | 7 |
| 1999 | 4 |
| 2000 | 4 |
| 2001 | 4 |
| 2002 | 6 |
| 2003 | 16 |
| 2004 | 13 |
| 2005 | 19 |
| 2006 | 25 |
| 2007 | 30 |
| 2008 | 27 |
| 2009 | 44 |
| 2010 | 32 |
| 2011 | 24 |
| 2012 | 36 |
| 2013 | 21 |
| 2014 | 22 |
| 2015 | 31 |
| 2016 | 22 |
| 2017 | 33 |



### Tilburðir av bróstkrabba

| Bróstkrabbi 1995 - 2017 | |
|---|---|
| Ár | Tilburðir |
| 1995 | 21 |
| 1996 | 17 |
| 1997 | 10 |
| 1998 | 15 |
| 1999 | 8 |
| 2000 | 21 |
| 2001 | 23 |
| 2002 | 23 |
| 2003 | 23 |
| 2004 | 29 |
| 2005 | 17 |
| 2006 | 17 |
| 2007 | 21 |
| 2008 | 21 |
| 2009 | 22 |
| 2010 | 25 |
| 2011 | 20 |
| 2012 | 21 |
| 2013 | 24 |
| 2014 | 21 |
| 2015 | 25 |
| 2016 | 30 |
| 2017 | 31 |



**Tilburðir av lungnakrabba**

| Lungnakrabbi 1995 - 2017 | |
|---|---|
| Ár | Tilburðir |
| 1995 | 9 |
| 1996 | 14 |
| 1997 | 17 |
| 1998 | 13 |
| 1999 | 10 |
| 2000 | 9 |
| 2001 | 11 |
| 2002 | 10 |
| 2003 | 10 |
| 2004 | 14 |
| 2005 | 13 |
| 2006 | 6 |
| 2007 | 15 |
| 2008 | 17 |
| 2009 | 14 |
| 2010 | 17 |
| 2011 | 12 |
| 2012 | 15 |
| 2013 | 15 |
| 2014 | 15 |
| 2015 | 19 |
| 2016 | 19 |
| 2017 | 15 |



**Tilburðir av krabbameini í brisi**

| Krabbamein í brisi 1995 - 2017 | |
|---|---|
| Ár | Tilburðir |
| 1995 | 1 |
| 1996 | 6 |
| 1997 | 4 |
| 1998 | 6 |
| 1999 | 6 |
| 2000 | 7 |
| 2001 | 6 |
| 2002 | 4 |
| 2003 | 4 |
| 2004 | 7 |
| 2005 | 4 |
| 2006 | 6 |
| 2007 | 6 |
| 2008 | 8 |
| 2009 | 8 |
| 2010 | 9 |
| 2011 | 5 |
| 2012 | 10 |
| 2013 | 8 |
| 2014 | 4 |
| 2015 | 5 |
| 2016 | 6 |
| 2017 | 12 |



### Tilburðir av undirlívskrabba

| Ár | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| C53-Lívmóðurhálskrabbi | 13 | 8 | 5 | 10 | 4 | 2 | 0 | 6 | 18 | 5 |
| C54-Lívmóðurkrabbi | 2 | 14 | 4 | 2 | 4 | 3 | 4 | 5 | 6 | 3 |
| C51-Vulvakrabbi | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 2 | 2 |
| C56-Eggrótakrabbi | 1 | 4 | 6 | 5 | 0 | 3 | 5 | 1 | 3 | 2 |




### Tilburðir av krabba í maga og tarmi

| Ár | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| C15 - krabbamein í spísirøri | 2 | 1 | 6 | 3 | 8 | 8 | 4 | 5 | 4 | 5 |
| C16 - krabbamein í maga | 3 | 5 | 3 | 6 | 5 | 2 | 9 | 10 | 4 | 3 |
| C18 - krabbamein í tjúkktarmi | 16 | 12 | 19 | 23 | 13 | 14 | 13 | 25 | 17 | 28 |
| C20 - krabbamein í endatarmi | 11 | 11 | 11 | 8 | 8 | 14 | 12 | 12 | 10 | 8 |



## Tilburðir av húðkrabba

| Húðkrabbi 1995 – 2017 | | |
|---|---|---|
| Ár | C43 Móðurmerkjakrabbi | C44 Vanligur húðkrabbi |
| 1995 | 0 | 15 |
| 1996 | 1 | 11 |
| 1997 | 0 | 10 |
| 1998 | 1 | 8 |
| 1999 | 6 | 9 |
| 2000 | 2 | 9 |
| 2001 | 1 | 17 |
| 2002 | 7 | 24 |
| 2003 | 4 | 24 |
| 2004 | 8 | 13 |
| 2005 | 7 | 49 |
| 2006 | 10 | 32 |
| 2007 | 6 | 22 |
| 2008 | 8 | 26 |
| 2009 | 2 | 23 |
| 2010 | 6 | 35 |
| 2011 | 5 | 23 |
| 2012 | 5 | 33 |
| 2013 | 3 | 38 |
| 2014 | 1 | 34 |
| 2015 | 3 | 40 |
| 2016 | 9 | 37 |
| 2017 | 8 | 43 |



### Yvirlit yvir øll krabbasløg seinastu 10 árini

| | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Prostatakrabbi | 27 | 44 | 32 | 24 | 36 | 21 | 22 | 31 | 22 | 33 |
| Bróstkrabbi | 21 | 22 | 25 | 20 | 21 | 24 | 21 | 25 | 30 | 31 |
| Lungnakrabbi | 17 | 14 | 17 | 12 | 15 | 15 | 15 | 19 | 19 | 15 |
| Brisi | 8 | 8 | 9 | 5 | 10 | 8 | 4 | 5 | 6 | 12 |
| Lívmóðurhálskrabbi | 13 | 8 | 5 | 10 | 4 | 2 | 0 | 6 | 18 | 5 |
| Lívmóðurkrabbi | 2 | 14 | 4 | 2 | 4 | 3 | 4 | 5 | 6 | 3 |
| Vulvakrabbi | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 2 | 2 | 2 |
| Eggrótakrabbi | 1 | 4 | 6 | 5 | 0 | 3 | 5 | 1 | 3 | 2 |
| Spísirørskrabbi | 2 | 1 | 6 | 3 | 8 | 8 | 4 | 5 | 4 | 5 |
| Magakrabba | 3 | 5 | 3 | 6 | 5 | 2 | 9 | 10 | 4 | 3 |
| Tjúkktarmskrabbi | 16 | 12 | 19 | 23 | 13 | 14 | 13 | 25 | 17 | 28 |
| Endatarmskrabbi | 11 | 11 | 11 | 8 | 8 | 14 | 12 | 12 | 10 | 8 |
| Móðurmerkjakrabbi | 8 | 2 | 6 | 5 | 5 | 3 | 1 | 3 | 9 | 8 |
| Húðkrabbi (vanligur) | 26 | 23 | 35 | 23 | 33 | 38 | 34 | 40 | 37 | 43 |
| Annar krabbi | 33 | 62 | 46 | 49 | 49 | 61 | 45 | 46 | 49 | 54 |
| **Samanlagt** | **188** | **230** | **224** | **195** | **211** | **216** | **189** | **235** | **236** | **252** |

Kelda: Landssjúkrahúsið

Krabbameinsskráseting Føroya, Medisinski depilin.

*NORDCAN http://www-dep.iarc.fr/NORDCAN/DK/frame.asp*